# BØNARLØTAN

**NOVEMBER** **2024** **39. árg.**

***1. Fríggjadagur*** ***Sálm. 18.26-51***



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 14, Leah 10, Abigail 6**

Fleiri enn nakrantíð vitja Barnaklubban, herfyri vóru um 25 vaksin og nógv børn, og nýggja samkoman er vaksin við tveimum familjum. Eitt av foreldrunum luttekur, tí barn teirra hevur áhuga at læra um Jesus. Jóhannis fer til eitt vikuskiftisskeið í evangelisering í eystara parti av Frankaríki. Hann undirvísir einum 40 flóttafólkum í fronskum máli. Tey brúka bíbliusøgur til undirvísingina. Tvey flóttafólk úr Sudan koma til bíbliutímar í samkomuni og vilja læra meira um Jesus. Vit takka fyri Guds trúfesti. Biðið, at vit røkka okkara fíggjarligu málum, so Jóhannis framvegis kann vera fulla tíð í tænastuni.

**ZAREPTA**
Seniorlega 1-3. nov.

**KRINGVARPIÐ**
Útvarpsmøti frá Betesda 1. des.
Sjónvarpsmøti úr Betania 1. des.

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**

| | | |
|---|---|---|
| Sunnukv. | kl. 21 | Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21) |
| Týskv. | kl. 21 | Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30) |

## *2. Leygardagur* — *Matt. 24.1-14*



**DANMARK**
**Anna og Hans Djurhuus**
Føroyskt møti verður leygard. 2. nov. kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsgade 2a í Aalborg. Vit gleðast um at síggja nýggj andlit á møtunum. Biðið framvegis fyri møtunum í Aalborg.

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
28. okt. - 2. nov. vitjar Peter á North Cotes fyri at lýsa tørvin í teimum ymisku londunum. 3-11. nov. verða vit bæði í Rumenia til NTM leiðarafundir. 12-25. nov. verða vit í Senegal til leiðarafundir og eitt forum. Biðið, at vit verða til signing í tænastuni.

## *3. Sunnudagur* — *Orðt. 13.1-25*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Vit fara nú til Rumenia at luttaka á árligu fundunum fyri NTM leiðarar í Evropa, har eg skal tala, og Judy verður við sum skrivari.

Vit flúgva aftur til USA 17. nov. Alt gekk væl, tá ið Judy skifti mjødn, men tað tekur nakrar mán., áðrenn hon fær gingið sum vanligt. Takk fyri forbønir.

## *4. Mánadagur* *Matt. 24.15-36*



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Emma Grace 16, Jónatan 15,**
**Markus 12, Evita 9, Joy 7**

4-8. nov. luttaka vit á *AMOR Divino* í Uruapan. Tað er ein verkætlan, sum bjóðar Guds Orð, eina traktat ella Jóh. ev. til hvørt hús í Michoacán, og bíbliulestur til tey, ið vilja vita meira. Nathan og Keyla Clark eru flutt hagar og fara at fylgja upp seinni.

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Vit vitja í Føroyum 4-11. nov. og vitja síðani fleiri samkomur í Onglandi. Á skúlanum halda vit fram at undirvísa og hjálpa til við at vegleiða næmingar í ymiskum.

**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 15, Ester 14, Samuel 10**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Kristina 13**
**– Danjal og Synnøve av Rana, Anna Emilie 9, Lukas 4**

## *5. Týsdagur* *Orðt. 14.1-35*

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Calvary Church hevur saman við Samaritans Purse verið til stóra

hjálp hjá teimum, ið vórðu rakt av storminum Helene. Minnist tey, sum hava mist bæði hús og starv. Vit hava høvi at siga teimum evangeliið um Jesus Kristus, sum elskar tey!

## *6. Mikudagur* — *Matt. 24.37-51*

### DANMARK, Kolding
### Anne og Jan Zachariassen

Jan: Jens Pauli í Dali og eg koma til Føroya nakrar dagar fyrst í nov. Ætlanin er at finna eitt filmstudio, har vit kunnu vísa teimum deyvu ein stuttan film út frá Mark. 1:1-8. Samkomur kunnu ringja til mín á +45 60 51 95 24, um tær vilja hava okkum at vitja.



### MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca
### Inga McKendry

Sue, eg og mixtectoymið halda fram at endurskoða Jóh. og Opinb. Biðið, at vit hegnisliga málbera sannleikarnar í orði Guds á mixtec.

## *7. Hósdagur* — *Orðt. 15.1-33*

### PAPUA NÝGUINEA, Kovol
### Natalie og Philip Hansen
### Louis 7, Timon 5, Manuel 0, Salome 0

Gud letur hurðar upp fyri okkum at venda aftur til PNG og Kovol í nov. Tað er ein spennandi tíð. Starvsfelagin, Steve Stanley, er liðugur at læra kovolmálið og mentanina, og vit eru eisini nærum liðug. Saman menna vit eina lesiførleikaætlan og fara skjótt á námskeið um bíbliutýðing við honum. Takk, at tit biðja!

## *8. Fríggjadagur* *Sálm. 19*



**RUMENIA**

11-19. nov. fara Svenning av Lofti, Poul Jóhan Djurhuus og Birgir Andreasen til Rumenia at hava evangelisk møtir úti sum inni. Vitjað verður í Uricani, á barnaheiminum Betania eins og í samkomum og heimum har. Eisini verður vitjað í Tirgu-Jiu í mongu romasamkomunum har um vegir.

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**

Bið fyri STEVN, verkinum á netinum, talum og samtalum. Bið fyri Pakistan og verki okkara har, eisini í hesum døgum, nú alt má gerast úr Føroyum.

## *9. Leygardagur* *Matt. 25.1-13*



**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Bíblian tosar um dirvi at vitna og liva fyri tann, sum ofraði seg sjálvan fyri okkum. Bið, at børn og ung, ið hava verið á legu, hava dirvi at vitna um og fylgja Kristusi í dagliga lívinum millum vinir og familju. Tørvur er á íslendingum, ið tora at vitna fyri sínum egna fólki.

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 7**

## *10. Sunnudagur* *Orðt. 16.1-33*




**OM, LOGOS HOPE,**
**TeenStreet**
Logos Hope er í Bridgetown á Barbados frá 13. nov. – 9. des. og so í Scarborough í Trinidad og Tobago til eftir jól. Doulos Hope er í Cebu á Filipsoyggjum til 12. nov. Móti jólum liggur leiðin til Kaohsiung í Taivan. Birita og John Timothy, sum virka í Japan, flyta í vár úr Sapporo til Nanae har suðuri á Hokkaido. Biðið, at tíðin í Sapporo endar væl, og at tey falla væl til í Nanae. Tey fara í farloyvi og verða í Norðurírlandi í des. og í Føroyum í jan. Hjalmar Gregersen er á missiónsskúlanum Reach í Birmingham.

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 13, Tabita 10, Debora 9, Natan 6**

## *11. Mánadagur* *Matt. 25.14-30*




**OM, SUÐURAFRIKA**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 1**
Frá 11. nov. fara vit við toyminum á outreach í tvær vikur. Vit fara út um meginøkið at hjálpa til á einum skúla, boða evangeliið fyri fólki í umhvørvinum og taka lut í samkomum. Biðið fyri fyrireikingunum, um góða heilsu hjá øllum, og at Harrin fær æruna.

### FØROYAR
### Else og Poul Johan Djurhuus

Biðið fyri Else, ið hevur drigist við sjúku gjøgnum árið. Takk fyri stuðul og forbøn, bæði frá samkomum og einstaklingum.

*Í dag fyllir Noah Elias 13 ár

## *12. Týsdagur* — *Orðt. 17.1-28*

### ONGLAND, European Christian Mission
### Dorit og Simon Marshall

Nú er liðugt at ferðast í ár. Tað hevur verið strævið, men gott at hava havt tíð saman við trúboðarum. Simon, aðrir leiðarar og verjar í ECM hittast 12-16. nov. at viðgera árið, ið fer, og at leggja ætlanir fyri 2025. Biðið, at Harrin leiðir og gevur vísdóm.

## *13. Mikudagur* — *Matt. 25.31-46*

### ONGLAND, Birmingham, OM
### Claire og Craig Niclasen
### Rebekah 16, Lydia 14



Eg, Claire, fari á skeið í London í dag. Biðið, at eg fái gagnnýtt tey nýggju amboðini í mínum dagliga arbeiði. Eg eri takksom fyri at arbeiða saman við nógvum fólkum úr ymiskum trúboðanarfelagsskapum. Biðið um einleika í Kristusi, og at Harrin signar verkið.

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

## *14. Hósdagur* — *Orðt. 18.1-24*

**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**



Vit gleða okkum at byrja arbeiðið í Kristnastovu. Í løtuni er nógv rokan við at flyta inn. Minnist samkomuna í bønum tykkara, nú nýggj tíð stendur fyri framman. Jógvan Zachariassen kemur niður hálvan nov. og luttekur á møtum og hevur bíblutíma.

**Susan og Øssur Berghamar**



Tænastan millum sjúklingar og avvarðandi er framvegis ein týðandi táttur í verkinum. Tað er truplari enn áður at finna fram til, hvar fólk eru innløgd. Tí tørvar okkum tykkara hjálp, og vit eru takksom, tá ið tit siga frá. Biðið, at henda tænasta framvegis skal vera til signing.

**– Sólva og Jákup Hansen**

## *15. Fríggjadagur* — *Sálm. 20 og 21*

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 14**

Fleiri danir koma til møtini. Biðið, at teir halda fram at koma, og

at fleiri leggjast aftrat. Nøkur nýggj donsk børn eru eisini byrjað at koma í sunnudagsskúla. Biðið fyri teimum og familjum teirra.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



## *16. Leygardagur* *Matt. 26.1-16*

**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**



Vit fegnast um, at 10-12 dreingir trúfast koma til barnamøtið *Naalersitaq Club*. Teir spæla á fótbóltsvøllinum við salin, skjóta við professionellum bogum og ørvum inni ella spæla borðspøl og fáa ein drekkamunn. So hoyra teir eina søgu ella boðskap úr Bíbliuni.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Vit hava roynt at vitja so nógvar samkomur sum gjørligt á Ssese oynni í Viktoriavatninum. Vit takka Harranum fyri at kunna sýna filmin *The Passion of the Christ* um Jesu krossfesting í fleiri bygdum, og at mong hjørtu verða rørd av boðskapinum. Biðið framhaldandi fyri tænastu okkara í Uganda henda mánaðin. Vit hava útsett ferðina aftur til USA til í des.

**FØROYAR**
**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 12, Petra 10**

## *17. Sunnudagur* *Orðt. 19.1-29*




**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 15**
18-26. nov. verða fundir, har fleiri NTM-leiðarar vitja okkum. Tørvur er á einum hjúnum at taka ábyrgd av gistingarhúsinum í Dakar. Í okt. byrjaðu vit ein bíbliuskúla, har 25 næmingar taka skeiðini. Teir møtast eisini eina ferð um vikuna. Biðið, at bíbliutímarnir eggja og verða til signing.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Mánadagur* *Matt. 26.17-29*

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 16, Noah 15, Karis 11, Judah 9, Ethan 6**
Biðið fyri fundunum 18-20. nov. um menning av samkomuni í PNG komandi ár. Biðið fyri Mengen fólkinum, fyri ferðum til Lele og Bologo samkomurnar og um opnar dyr fyri evangeliinum. Biðið um einleika bíbliulæraranna. Biðið fyri Manuelu, konu Vincent bíbliulærara, sum er sjúk. Haldið á at biðja fyri Anniku, mær og børnum okkara, sum vit laga okkum til nýggju umstøðurnar.

## *19. Týsdagur* *Orðt. 20.1-30*

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett (fjararb.)**
Vit umboðaðu Frontiers á einum tiltaki, har vit eggjaðu ungum at fara út á missónsmarkina í bæði stutt- og langtíðartænastu. Annað tiltak í nov. fokuserar á muslimska heimin. Biðið, at nógv verða kallinum lýðin. Ümit bólkurin hevur outreach í Turkalandi, serliga har ongar samkomur eru, ella har bert fá trúgvandi eru. Tey hava eisini venjingarseminar, tá luttaka á leið 50 fólk.

## *20. Mikudagur* *Matt. 26.30-46*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 3, Selah Rose 1**
Vit halda fram at læra asmat-málið og mentanina. Okkum tørvar meira brennievni, áðrenn nógv alda kemur við árstíðini. Biðið fyri okkara tørvum.

## *21. Hósdagur* *Orðt. 21.1-31*

**ATLANTIC MISSION**
Biðið fyri evangeliseringsferðini, ið varð gjørd til Bømlo í Noregi 11-18. okt., fyri føroyingunum, ið búgva har, fyri teimum trúgvandi og fyri teimum, sum á ymsan hátt fingu gleðiboðskapin - í skrift, samtalu, sangi og talu.

## *22. Fríggjadagur* *Sálm. 22*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 12, Emma 8**

Vit kenna, at tíðin er komin at flyta samkomuna inn í Campobasso (50.000 íbúgvar). Síðan samkoman byrjaði fyri 15 árum síðani, hava vit hugsavnað okkum um bygdirnar kring Campobasso. Men nú koma alsamt fleiri fólk úr Campobasso á møtini. Biðið, at Gud ger hetta møguligt, um tað er Hansara vilji.



**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 13**

## *23. Leygardagur* — *Matt. 26.47-58*

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 11, Micah 11**
Vit takka Harranum fyri góða samkomulegu í sept., har fýra vórðu doypt. Biðið, at húsbólkarnir í samkomuni eru til signing fyri øll tey, sum koma saman har.



**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

## *24. Sunnudagur* — *Orðt. 22.1-29*

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 8, Jude 6, Evelyn 4, Olivia 1**
Vit vitjaðu saman við lokalum samkomuleiðarum fimm bygdir hjá Qaget ættarbólkinum í East New Britain. Allar vístu áhuga fyri at fáa okkum trúboðarar at liva og virka millum tey. Biðið um trygd

og vísdóm, nú vit nærkast búseting millum ættarfólkið, og biðið, at vit minnast tørvin hjá børnum okkara, nú trúboðanarlívið verður meira krevjandi.

## *25. Mánadagur* *Matt. 26.59-75*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**
Tað gekk væl at prenta 2. Mós., og fólk eru glað fyri at hava fingið eina bók aftrat úr Bíbliuni. Vit halda fram at fyrireika og gera NT klárt til prent. Ungi umsetarin ger kladduna til 1. Kong. Regntíðin hevur verið góð. Biðið, at grøðin ikki verður oyðslað burtur.

## *26. Týsdagur* *Orðt. 23.1-35*

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**



Anna fyllir 70 ár 29. nov. Síðan 1974 hava vit verið stuðlað, og eftir 25 ár við sjúku eru vit toluliga væl fyri enn. Gud hevur brúkt okkum at greiða, hvussu balantamálið skuldi skrivast, at byrja verkið millum saafifólkið, at umseta nógvar sangir og at seta skriftorð til tónleik. Gleðist við okkum í Harranum.
Sí: www.youtube.com/watch?v=KrkW68A3c4A

## *27. Mikudagur* *Matt. 27.1-20*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Minnist brøður og systrar okkara úr Ukraina, sum koma til okkara sum flóttafólk. Biðið, at tey kenna Guds nærveru mitt í øllum mót-

ganginum. Vit hava samband við fleiri ukrainar, og nakrir teirra savnast trúfast saman við okkum.



**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. Hósdagur* *Orðt. 24.1-34*

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 16**

Tim: Eg fekk høvi at undirvísa fólki í Mepiang frá skapanini til Jesu uppreisn. Eftir einar 42 bíbliutímar hoyrdu um 60 fólk evangeliið fyrstu ferð. Fleiri góvu vitnisburð og søgdu seg trúgva tí, tey høvdu hoyrt. Biðið, at tey halda á og vaksa í trúnni.

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen.**

Vit kenna, at Harrin nú leiðir okkum aftur til Filipsoyggjar, og vit gleða okkum at vitja kankanaeyfólkið aftur. Heilsan hjá Liz er heldur frægari nú. Ovast á skránni er rættlestur av Rómbr. Hetta krevur tíð og orku fyri at tryggja, at boðskapurin um m.a. frelsu, rættvísgering og heilaggering verður greiður. Vit eru Gudi takksom og leggja okkum í Hansara hendur.

## *29. Fríggjadagur* *Sálm. 23*

**TAILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 12, Noah Kristian 10**

Biðið fyri framhaldandi arbeiðinum at hjálpa íbúgvunum her í Chiang Mai, ið vórðu rakt av vatnflóðini fyrst í okt. Tann 7. okt. mistu starvsfelagi okkara Jana og maðurin Joe sonin Jonathan í einari motorsúkkluvanlukku. Biðið, at Harrin troystar og styrkir foreldur og avvarðandi í sorgini.

## GRØNLAND, Qaqortoq
## Marjun og Páll Poulsen

Jesus, Paulus og Pætur nevna Satan og hindrandi virki hansara í sambandi við evangeliið. Bardagin hjá okkum øllum er við andaher óndskaparins. Biðið fyri Orðinum, ið hevur verið sáað í summar, har tað nú liggur - í minni, tilvitsku ella undirtilvitsku – at tað skal bera ávøkst, um so long tíð gongur.

## JAPAN
## Shino og Hallur Mortensen
## Kano 15, Nana 13, Louie 10, Rio 5


Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## 30. Leygardagur — Matt. 27.21-44

### THE VERITAS FORUM
**www.veritas.org**

Í samrøðu á New York University í 2017 spyr Tim Keller: *Hvat er endamálið við pluralismu?* Vit hoyra ofta, at samfelagið skal rúma øllum fatanum, hugsanum og mentanum. Hvar er sannleikin í hesum høpinum, og hvussu tekur tú kristnu trúnna inn í hetta kjakið? Enskt podcast (17 min.): www.veritas.org/podcast/whats-the-point-of-pluralism-tim-keller



### BÓKATÆNASTAN
Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope.

FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo